| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>26. januar 2006 | Blað nr.:<br>6457 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **26. januar 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **1/06-19/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Inga Dahl
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**6/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið til eftirtektar.

**7/06** **2002-2686**

**Umsókn um øki til Dansifrøi og stuðul til bygging.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um øki og loyvi til felagsbygging til 2 felags høli til Dansifrøi og Fimleikafelagið Ljósið.

Feløgini vísa á øki í Gundadali, ið er ogn hjá TK, og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j.nr. 200202686-2
Tekningar av skitsuprojekti: j.nr. 200202686-2
Kortskjal av økinum: j.nr. 200202686-3

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Dansifrøi hevur fyrr havt samband við umsitingina, har teir hava søkt um at fáa útvega økið, men hava ikki víst á nakað, sum umsitingin hevur mett verða gongd leið.

Umsitingin hevur havt samráðingar við fimleikafelagið í sambandi við, at teir upprunaliga søktu um einhvørja høll, av tí at teir høvdu stóran hølistørv. Í hesum sambandi vísti umsitingin tá á, at teir arbeiddu við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki, nú saman við Dansifrøi.

Arkitekturin hevur verið á byggideildini og framlagt verkætlanina fyri býararkitektinum og hevur fingið at vita, at ymisk viðurskiftir uttanfyri, so sum parkering og ferðsla í sambandi við verkætlanina skulu endaliga viðgerast í samráð við umsitingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata umsøkjaranum økið at byggja verkætlanina á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður umsøkjaranum, at skipa soleiðis fyri, at parkering og onnur uttanumviðurskifti verða gjørd í samráð við umsitingina hjá TK.

Endaliga verður gjørt vart við, at endalig umsókn um byggiloyvi skal leggjast fyri nevndina aftur, tá ið allar tekningar og neyðug loyvi fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2003:** Mikael Viderø, býararkitektur, kunnaði nevndina um felagsbygningin hjá Dansifrøi og Fimleikafelagnum Ljósinum.

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 29. september 2003 treytað av, at ungdómsdansur verður ein partur av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at taka upp samráðingar um økið.

**Ískoyti:**
Broyting er hend soleiðis, at fimleikafelagið Ljósið er farið úr verkætlanini. Felagið Dansifrøi er komið við broyttari verkætlan.

Nýggjar tekningar eru komnar frá Arkitektavirkinum Magnus Hansen.

Gólvvíddin er 840 $m^2$.

Mesta hædd á bygningi 9,5 m.

Tal av bilstøðlum 40, kravt tal av bilstøðlum 1 stk/50 $m^2$.

Av tí at enn ikki er avgjørt um grundøkið skal frámatrikulerast, ber ikki til at rokna byggistig ella nettonýtslustig.

Bygningurin liggur í økispartinum D2 ítróttarøki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at broytta verkætlanin verður góðkend, og at umsóknin um byggiloyvi verður gingin á møti. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin viðger nýggju fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at góðkenna broyttu verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Samstundis verður spurningurin um tær nýggju fíggjarligu fyritreytirnar beindur í viðkomandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur, tá mentamálanevndin hevur viðgjørt málið.

**Nýggj umsókn um stuðul**.

**Á fundi í mentamálanevndini 10. februar 2004** samtykti nevndin at játta 30% av kr. 16.500.000,00, sum býráðið á fundi 19. februar 2004 samtykti at taka undir við mentamálanevndini, sum sostatt fellur burtur nú nýggj umsókn er komin.

Í nýggju umsóknini, dagfest 11. juli 2005, er kostnaðarmetingin kr. 7.600.000,00 tilsamans uttan MVG ella kr. 9.500.000,00 við MVG, og søkir Dansifrøi um øktan stuðul frá teimum 30% til 60% fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki beinanvegin.

Við 30% kr. 2.850.000,00 og 60% kr. 5.700.000,00.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta 60% av kr. 9.500.000,00 svarandi til kr. 5.700.000,00 í stuðli av konto 64, og at leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevdina, til góðkenningar.

Eisini samtykt at heita á umsitingina um at gera avtalu um nýtslurætt til hølini til m.a. ungdómsdans og leggja avtaluna fyri nevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Málið var umrøtt og samtykt í prinsippinum at taka undir við mentamálanevndini at veita 60% í stuðli, nú landið ikki stuðlar, við nærri treytum og at leggja málið fyri á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at stuðla hallarbyggingina við 5,7 mió. kr. yvir 5 ár við trygd í ognini og avtalu um nýtslurætt og at leggja málið fyri mentamálanevndina og býráðið.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**8/06** **2004-0716**

**Skriv frá Advokatskrivstovuni fyri p.f. Danberg í likvidatión, dagfest 5. mars 2004, um yvirtøku av Stiðjagøtu, matr. nr. 1076a**

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt meting um støði á Stiðjagøtu og gjørt leysliga kostnaðar-meting av ábótum á vegøkið, fyri at vegurin kann koma á tað støði, Tórshavnar kommuna setir til tílíkar vegir.

Sambært mannagongdum í sambandi við yvirtøku av privatum vegum (j. nr 2002-2712/7) má vegurin verða settur í bólk 2, tvs. vegur sum á ein ella annan hátt aldrin er yvirtikin.

**Tekniska nevnd 24. august 2004:** Málið varð útsett til juritiskt responsum og tilmæli fyriliggur.

**Ískoyti:**
Skriv frá Advokatskrivstovuni, dagfest 13. september 2005, um at búgvið er tikið uppaftur, so formliga er einki til hindurs fyri at avhenda vegin til kommununa, og er tað upp til partarnar at gera av eftir hvørjum treytum, avhendingin skal fara fram.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Málið útsett, tí at juridiskt responsum og tilmæli frá teknisku nevnd ikki fyriliggur.

**Ískoyti:**
Juridiskt responsum fyriliggur í málinum.

**Tilmæli**:
Býarverkfrøðingurin mælir til at yvirtaka Stiðjagøtu og at beina málið í fíggjarnevndina.

Gjørt verður vart við, at kommunan eigur at gera virkjunum í gøtuni greitt, at Tórshavnar kommuna ikki sær seg føra fyri at gera nakað við vegin í 2006, men at ábøtur verða gjørdar í tann mun fígging er tøk til hetta.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen, samtykti at yvirtaka vegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við tilmælinum hjá býarverk-frøðinginum, men at arbeiðið at gera ábøtur verður gjørt í 2006.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

9/06 **2004-2600**

**Ognarviðurskiftini og reglugerðin hjá Eldrasambýlinum í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Við skrivi, dagfest 05. november 2004, boðaði Almanna- og heilsumáraráðið frá, at politisk avgerð var tikin um, at ognarviðurskiftini viðvíkjandi eldrasambýlum skuldu vera eins kring alt landið, og at landsstýrismaðurin fór at boða kommununi til fundar so skjótt greiða var fingin á, hvussu ítøkiligu broytingarnar av ognarviðruskiftunum skuldu fremjast.

Einastu eldrasambýlini, sum eru landsogn og fult út rikin av landinum, eru tey í Kollafirði og Vestmanna. Onnur eldrasambýli í landinum eru kommunal ogn, og rinda kommununar fyri náttarvaktina.

Umboð fyri Tórshavnar og Vestmanna kommunu vóru á fundi við landsstýrismannin tann 22. august 2005, har greitt varð frá, at uppskot nú verður lagt fyri løgtingið, um at kommunurnar frá 1. januar 2006 skulu yvirtaka ognirnar og útreiðslurnar í sambandi við náttarvaktina.

Fyri Tórshavnar kommunu merkir hetta eina meirútreiðslu uppá um leið kr. 500.000,00 um árið.

**Sosiala nevnd 30. august 2005:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Løgtingið samtykti 13. desember 2005 endaliga lógaruppskotið frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum um avhendan av eldrasambýlunum í Vestmanna og Kollafirði til Vestmanna og Tórshavnar kommunur.

Lógin ber við sær, at eldrasambýlið í Kollafirði frá 1. januar 2006 er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Á fíggjarætlan kommununnar fyri 2006 eru settar av kr. 450.000,00 kr. til kommununnar part av rakstrarútreiðslunum.

Uppskot til reglugerð er gjørd fyri sambýlið, og er hon soljóðandi:

**Reglugerð**
**fyri**
**Eldrasambýlið í Kollafirði**

**§ 1**
**Navn og heimstaður**

Navn stovnsins er Eldrasambýlið í Kollafirði.

Eldrasambýlið er kommunalur stovnur við heimstaði í Tórshavnar kommunu.

**§ 2**
**Endamál**

Endamálið er

at vera fast búpláss hjá fólkapensiónistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki at hjálpa teimum í dagligu tilveruni, og í hesum sambandi at leggja til rættis umsorgarliga viðferð, sum fremur vælveru hjá tí einstaka.

at heimabúgvandi fólkapensiónistar kunnu koma á heimið til umlætting alt samdøgrið ella partar av samdøgrinum, í styttri ella longri tíð, fyri at lætta um hjá teimum avvarðandi.

Stk. 2. Í tann mun, tað er sambærligt við endamálið, sum lýst er í stk. 1, kunnu onnur enn fólkapensiónistar verða upptikin á heimið.

**§ 3**
**Rakstur**

Rakstrarútreiðslurnar av sambýlinum rindar Tórshavnar kommuna.

Stk. 2. Heimarøktin letur starvsfólk til dag-, kvøld- og náttarvakt og fyrisitur røktina á heiminum. Kommunan rindar náttarvakt sambært uppgerð og rokning frá heimarøktini.

Stk. 3. Brúkararnir á sambýlinum rinda kommununi uppihaldsgjald eftir reglunum í kunngerð nr. 71 um eldrasambýli frá 27. august 1998 við seinni broytingum.

Stk. 4. Kommunustýrið og heimarøktin avtala nærri mannagongd í sambandi við umsiting av dagliga húsarhaldinum, av uppihaldsgjaldinum í sambandi við umlætting og av uppihaldagjaldinum hjá fastbúgvandi búfólkunum.

§ 4
**Upptøka**

Avgerð um upptøku verður tikin av eini upptøkunevnd.

Stk. 2. Fram til heimild er fingin at seta felags visitatiónsnevnd til øll eldrabútilboð í Tórshavnar kommunu, eru í upptøkunevndini til eldrasambýlið hesir limir:

Eitt umboð, tilnevnt av kommununi, ið er formaður og skrivari
Ein kommunulækni, tilnevndur av Almanna- og heilsumálaráðnum
Ein heimasjúkrasystir
Økisleiðarin fyri heimarøktina í Suðurstreymoy

Nevndin er viðtøkufør, tá meirilutin er møttur.

Stk. 3. Heimið er fyri borgarar úr Tórshavnar kommunu, , tó kunnu umsøkjarar úr øðrum kommunu fáa innivist á heiminum, um so er, at pláss er tøkt, og avvarðandi kommuna játtar at rinda kommununar part av rakstrinum, náttarvakt, húsaútreiðslur o.a.

§ 5
**Fíggjarætlan**

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

Stk. 2. Tórshavnar kommuna ger ársfíggjarætlan fyri eldrasambýlið saman við kommunalu ársfíggjarætlanini.

§ 6
**Starvsfólk v.m.**

Eftir tilmæli frá økisleiðaranum fyri heimarøktini í Suðurstreymoy, setir og loysir stjórin fyri Heimarøktini og Serforsorgini fólk úr starvi, sum arbeiða á sambýlinum.

Stk. 2. Búfólk á sambýlinum fáa heimahjálp undir somu treytum, sum tá tey búgva heima og hava í øllum lutum ábyrgd av sær sjálvum og fyri teimum ognarlutum, tey hava við sær á sambýlið.

§ 7
**Gjald fyri innivist**

Búfólk rinda fyri el, olju, mat og aðrar fastar útreiðslur.

Stk. 2. Gjald fyri innivist verður ásett av Almanna- og heilsumálaráðnum í kunngerð um eldrasambýli.

Stk. 3. Búfólk ella teirra avvarðandi umsita sjálvi teirra pening.
Stk. 4. Gjald fyri innivist verður flutt á konto í peningastovni hjá Tórshavnar kommunu.

**§ 8**
**Eftirlit og ábyrgd**

Tórshavnar kommuna hevur eftirlit og avgerðarrætt á sambýlinum, tá tað snýr seg um viðurskifti, ið ikki hava við starvsfólkaligu og røktarligu viðurskiftini á heiminum at gera.

Heimarøktin hevur eftirlit og avgerðarrætt við starvsfólkaligu og røktarligu viðurskiftunum.

**§ 9**
**Góðkenning og broytingar**

Hendan reglugerðin verður at góðkenna av Almanna- og heilsumálaráðnum, sambært § 32, stk. 4 í forsorgarlógini, sum eisini skal góðkenna broytingar í reglugerðini.

**Tilmæli:**
Sosialdeildarleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at góðkenna uppskotið til reglugerð.

**Sosiala nevnd 10. januar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá sosialdeildarleiðaranum og trivnaðarstjóranum um reglugerð fyri eldrasambýlið í Kollafirði.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**10/06** **<u>2005-1369</u>**

**<u>Mál um keyp av sethúsum í Ovarugøtu 46 í Hoyvík til barnagarð til børn við serligum tørvi</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í kommununi eru fleiri børn, ið eru so mikið illa fyri av sínum breki, at tey ikki kunnu nýta vanliga dagansingartilboðið, sum kommunan hevur.

Sum er, ganga børnini í smábarnadeildina á Sernámsdepilinum, men kunnu bert vera har 4 fyrrapartar um vikuna.

Fleiri royndir hava verið gjørdar at lata hesi børn ganga á vanligum stovni, men tey eru ikki ment at fylgja við í einum vanligum gerandisdegi í einum barnagarði.

Eisini verða hesi børn meira sjúk enn onnur at vera millum nógv børn.

Kommunan hevur sera góðar royndir av serstovuni í Øksnagerði, sum er fyri børn við samskiftistrupulleikum, har karmarnir eru støðugur, og pedagogiska støðið sera høgt. Bæði børn, foreldur og starvsfólk eru sera fegin um hetta tilboðið.

Umsitingin hevur verið og hugt eftir einum húsum í Ovarugøtu inni á Gøtu, tætt við Býlingshúsið inni á Gøtu. Húsini eru við nøkrum broytingum sera væl egnað til rørslutarnað børn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir fíggjarnevndini, um mentamálanevndina, at bjóða uppá húsini.

**Mentamálanevndin 1. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur bjóðað uppá húsini, og er boðið komið uppá kr. 1.725.000,00, sum seljarin hevur góðtikið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til, at kommunan keypir húsini og at játta upp til kr. 1.900.000,00 av íløgum til barnaansing til keyp og snærri umvælingar.

**Býráðið fyri læstum hurðum 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um uppskot frá Sjúrða Olsen um at senda málið til grannahoyring, áðrenn keypt verður, sum fall við 6 fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðani var atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 12 atkvøðum fyri 1 ímóti. Ímóti atkvøddi Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Tíðliga í summar fór umsitingin at kanna møguleikan fyri at keypa eini hús til serstovn, til børn við fjølbreki. Kommunan hevur ikki havt nøktandi tilboð til hesi børn – og nú vóru børn á bíðilista, ið høvdu brúk við hesum serliga tilboði. Á býráðsfundi 23. juni 2005, varð samtykt at keypa ognina í Ovarugøtu 46 í Hoyvík til serstovn.

Kommunan hevur havt fleiri fundir við Almanna- og heilsumálaráðið og Almannastovuna, sum eru partar í málinum, tá tað snýr seg um, at stovnseta stovnar til børn við serligum tørvi. Men sambært forsorgarlógini ( gr. 17), barnaverndarlógini (gr. 82) og lóg fyri dagstovnar og dagrøkt (gr. 5), sum eftir ætlan verða broyttar og samtyktar í løgtinginum innan árslok, hevur kommunan tá ikki heimild at útvega hesum børnum, við so serligum tørvi, tilboð á einum serstovni í kommununi. Landið hevur ábyrgd av at veita hesum børnum nøktandi tilboð og hevur Almanna- og heilsumálráðið við skrivi, dagf. 5. des. 2005, boðað frá, at tey ikki fara at stovnseta ein tílíkan stovn í 2006.

Nú kommunan ikki hevur heimild at brúka ognina í Ovarugøtu til ætlaða serstovn, eigur umsitingin at kanna møguleikan fyri at nýta ognina til annað endamál til frama fyri børn og ung í kommununi.

Til dømis ber væl til, við nøkrum broytingum, at nýta húsini til vøggustovu til 12 børn, treytað av at avvarðandi myndugleikar góðkenna verkætlanina. Fíggjarárið 2006 eru kr. 383.000 settar av til at reka serstovnin fyri (restin skuldi fíggjast um stuðuslfólkaskipanina). Fyri 12 vøggustovubørn er kommununnar partur (70%) kr. 775.068 til lønir og vanligan rakstur, munurin er kr. 392.068, sum kann fíggjast av konto 59 – regulering av barnatalið við ársenda.

Harumframt er neyðugt at gera íløgu til skýlið til barnavognar, gera spælipláss, keypa útgerð og annað. Mettur kostnaður kr. 350.000.

Parkeringsviðurskiftini við stovnin eru vánalig, tí er alneyðugt at stovnurin far loyvi at nýta fríøki (1 X Z), sum liggur sunnanfyri húsini til parkering, har ein vøggustova krevur væl meiri parkeringspláss enn ætlaði serstovnurin.

Um vøggustova skal gerast, skal verkætlanin sendast til grannahoyringar.

Til tess at fáa sum mest burturúr, verður neyðugt við tøttum samstarvi við Býlingshúsið inni á Gøtu.

Umframt omanfyri nevnda møguleika, eigur umsitingin at kanna, hvat ognin annars kann nýtast til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at mentamálanevndin heitir á umsitingina um at kanna møguleikan fyri at gera vøggustovu í húsunum, ella um ognin kann nýtast til annað endamál, til frama fyri børn og ung í kommununi.

**Mentamálanevndin 8. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað ymisk viðurskifti í sambandi við, um ognin í Ovarugøtu 46 ikki kann nýtast til annað endamál til frama fyri børn og ung í kommununi.

Skal vøggustova gerast, verður alneyðugt at skipa økið uttanum heilt øðrvísi, gera skýlið til barnavognar og torført verður at útvega fleiri parkeringspláss.

Skulu húsini nýtast til annað endamál til børn og ung, kundi tað verið til eitt barna- og ungdómshús fyri økið í Hoyvík, tí tað førir ikki nógva bilferðslu við sær.

Umsitingin er komin til ta niðurstøðu at frægast er at selja ognina í Ovarugøtu 46 í Hoyvík aftur.

Kommunan rindaði kr. 1.725.000 fyri húsini, og vóru kr. 175.000 settar av til umvæling og innbúgv. Kr. 186.000 eru nýttar til at mála øll húsini innan, smærri umvælingar, nýtt baðirúm o.a.. Eisini hevur kommunan rinda kr. 12.400 fyri innbúgv og leikur. Hetta seinasta fáa vit nýtt á øðrum dagstovnum í kommununi.

Tinglýsingin kostaði kr. 30.000 og onnur gjøld í samband við húsakeyp, og stendur ognin tí kommununi í kr. 1.953.400

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at selja ognina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at selja ognina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**11/06** **2006-0112**

**Leingjan av leigumálinum viðv. matr. nr. 907k, Tórshavn.**

Leigumálið um lendi undir gl. húsunum hjá Hans á Lag, sum Føroya Forngripafelag hevur við kommununa í 20 ár, er útgingið 21. apríl 2000.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leingja leigusáttmálan í 20 ár.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**12/06** **2003-2432**

**Val av 2 limum og varalimum í nevndina fyri Lágargarð fyri 2 ár.**

Hesi standa fyri vali Ronald Poulsen/Ása Poulsen og Bente Kjær/Jákup Danielsen.

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Bente Kjær/Jákup Danielsen og Ronald Poulsen/Ása Poulsen.

**13/06** **2005-1518**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum røktarheimi við Hoyvíkstjørn sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Katrin Dahl Jakobsen og Beate L. Samuelsen.

**14/06** **2006-0256**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum skúla í Hoyvík sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Jógvan Arge og Jan Christiansen.

**15/06** **2006-0257**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri rennibreytini sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Leivur Hansen og Sjúrður Olsen.

**16/06** **2003-2394**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri útbyggingini av Argja Skúla sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Hildur Eyðunsdóttir og Annika Olsen.

**17/06** **2006-0260**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri kommunala sambindingarvegnum millum Vegin Langa og Ytra Ringveg sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vóru Marin Katrina Frýdal og Høgni Mikkelsen.

**18/06** **2006-0258**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum ellisheimi Yviri við Strond sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið av skrá.

**19/06** **2006-0259**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum reinsiverki í Havnardali sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 18:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |